# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling - djúpt. Túrur nr. 1640
# Tíðarskeið: 15-27/09-2016

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen og Lise Helen Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (kanningarleiðari og toktleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágslemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini klokkan 23:00 hóskvøldið 15/9. Byrjaðu við at taka støðirnar eystur og suður av Munkagrunninum. Síðani á Wyville Thomsonryggin, á Føroyabanka, Bill Bailybanka (Ytrabanka), Lúsabanka (Ytstabanka), og vestur og norður av Landgrunninum (Mynd 1). Veðrið var sera vánaligt allan túrin, so vit lógu bakk 4 ferðir, í 2 døgn tilsamans. Komu inn týsdag 27/9 kl. 14.20.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í sýnishondbókini) vóru brúkt til øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon *et al.* 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða verður ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2016.

**Fyribilsúrslit:** 79 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 73 góðkendar. 75 ymisk fiskasløg vórðu skrásett. Um nøgdin í kg pr. støð verður samanborin við hini árini, so er nøgdin av kubbuta langasporli og trantkongafiski nærum óbroytt, nøgdin av blálongu og gulllaksi nakað størri, og nøgdin av brosmu, stinglaksi og svartkalva nakað minni. Eins og í fjør varð gýtandi gulllaksur fingin vestan fyri Mykines á umleið 600 m dýpi. Eisini var gýtandi hávur fingin í onkrum hálum. Eitt nýtt fiskaslag varð skrásett fyri fyrstu ferð undir Føroyum. Eitt langasporl (*Bathygadus* sp.) (Mynd 2), men slagið er ikki endaliga staðfest enn.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1640.

**Talva 1.** Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| SVARTKJAFTUR | 9648.854 | | | 66 |
| KIKARAFISKUR | 6136.552 | 22 | 11 | 19 |
| GULLLAKSUR | 5926.454 | 191 | 76 | 57 |
| HAVMÚS | 3405.121 | | | 41 |
| TRANT KONGAFISKUR | 3291.019 | 114 | 11 | 48 |
| BLÁLONGA | 2266.969 | 146 | 58 | 39 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1841.548 | 59 | 10 | 20 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 1670.186 | | | 28 |
| GÓMAHOLSHÁVUR | 1641.596 | | | 11 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 1291.459 | 5 | 5 | 33 |
| STINGLAKSUR | 1273.294 | 103 | 11 | 19 |
| SVARTKALVI | 834.480 | 84 | 40 | 18 |
| SKRUBBHÁVUR | 801.760 | | | 19 |
| NEVHÁVUR | 374.095 | | | 13 |
| HÁKELLING | 347.559 | | | 1 |
| TINDASKØTA | 343.724 | | | 15 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 294.629 | 30 | 7 | 11 |
| ÍSHAVSSKØTA | 273.331 | | | 3 |
| LONGA | 271.670 | 38 | 8 | 10 |
| SVARTHÁVUR | 238.077 | | | 5 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 159.594 | | | 24 |
| HALAHVASSA SKØTA | 152.740 | | | 6 |
| BROSMA | 150.790 | 56 | 3 | 24 |
| HAVTASKA | 135.250 | | | 13 |
| HÝSA | 130.631 | 10 | 5 | 2 |
| BLÁGÓMUR | 130.185 | | | 5 |
| SLÆTTHØVD | 125.249 | | | 7 |
| MORA | 103.401 | 18 | | 15 |
| ÚLVFISKUR | 88.984 | | | 10 |
| BLÁRIDDARI | 68.101 | | | 22 |
| GLÍGGJHÁVUR | 65.700 | | | 2 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 64.622 | | | 13 |
| GLÝSUFISKUR | 58.895 | | | 1 |
| UPSI | 52.350 | 8 | | 7 |
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 49.035 | | | 3 |
| LÍTLA BROSMA | 48.317 | 16 | | 19 |
| LÝSINGUR | 42.620 | 10 | 2 | 3 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 41.373 | | | 6 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 31.006 | | | 9 |
| SVARTFISKUR | 28.830 | 2 | 2 | 7 |
| TOSKUR | 19.830 | 3 | 2 | 2 |
| KLÆNASPORL | 18.138 | | | 13 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 15.445 | | | 6 |
| REYÐKRABBI | 11.940 | | | 5 |
| RONDSVARTI HÁVUR | 11.018 | | | 2 |
| LÁLLA | 10.989 | | | 6 |
| TINDABAK | 10.115 | | 1 | 2 |
| SANDSKØTA | 9.490 | | | 3 |
| LIRI | 9.230 | | 1 | 2 |
| KLINGRUSKØTA | 9.115 | | | 5 |
| SILVURMURTUR | 6.271 | | | 4 |
| RÍSNA LANGASPORL | 5.599 | | | 2 |
| STÓRA LAKSATOBIS | 5.153 | | | 4 |
| ÚLVFISKABRÓÐIR | 3.715 | | | 1 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 3.602 | | | 10 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 3.330 | | | 1 |
| MAKRELUR | 2.493 | | | 1 |
| OCTOPUS | 2.145 | | | 2 |
| GLASKVOYSA | 1.953 | | | 3 |
| SMÁTINDABAK | 1.809 | | | 2 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 1.779 | | | 3 |
| HVASSASPREK | 1.345 | | | 2 |
| TRØLLAKRABBI | 1.223 | | | 1 |
| SILD | 1.088 | | | 2 |
| FAGURSERKUR | 9.145 | 5 | 5 | 1 |
| GUNTERS LANGASPORL | 1.072 | | | 2 |
| LANGASPORL | 0.858 | | | 2 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| REYÐA HORNABROSMA | 0.848 | | | 1 |
| LÍTLIGLÁMUR | 0.768 | | | 4 |
| KÁMI ÚLVFISKUR | 0.657 | | | 1 |
| SLÆTTA LANGASPORL | 0.502 | | | 1 |
| LOLIGO | 0.290 | | | 1 |
| KRYTTLINGUR | 0.205 | | | 1 |
| SNÍPUÁLLUR | 0.120 | | | 1 |
| SPÍSKA LANGASPORL | 0.076 | | | 1 |
| SMÁSKRUBBUTA LANGASPORL | 0.061 | | | 1 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.057 | | | 1 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.030 | | | 1 |
| KNURRHANI | 0.029 | | | 2 |
| ÓKENT LANGASPORL | 0.026 | | | 1 |
| LÍTLI PRIKKAFISKUR | 0.012 | | | 1 |
| Ymist (ostur, skrambul v.m) | 688.098 | | | |
| **TILSAMANS** | **44769.719** | **920** | **258** | |




**Mynd 2.** Langasporl (*Bathygadus* sp.) 174 mm langt og 26 g, fingið norðan fyri Bill Baileybanka á umleið 800 m dýpi.

**Viðmerkingar:** 45 genetikkprøvar av blálongu frá 5 ymiskum økjum og 100 genetikkprøvar av stórum gulllaksi frá ymiskum økjum vórðu tiknir. Myndir vórðu tiknar av 25 ymiskum sjáldsomum fiskum, sum síðani vórðu frystir (saman við støðnummari) til fiskasavnið hjá Søvnum Landsins. Eisini vórðu nógvir ymiskir forkunnugir fiskar o.a. fryst til Vísindavøkuna.
Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

Lise H. Ofstad